## Bústjórin eftir ognum

Jón Ásgeir Jóhannesson, sum stovnaði íslendska stórfelagið Baugur, hevur eftir øllum at døma tikið virðismiklar ognir út úr felagnum tá tað fór av knóranum, og teimum vil bústjórin nú hava fatur á. Berlingske Tidende skrivar, at tá búgvið varð gjørt upp, restaðu 10 milliardir danskar krónur í at fáa javnvág. Tí roynir bústjórin at fáa fatur á einum gistingarhúsi í teimum fronsku Alpunum og einari marglætisíbúð í Keypmannahavn, sum stovnarin og fyrrverandi stjórin hevur tikið út úr felagnum og flutt til eitt felag, sum hann eigur, og sum eitur Gaumur, skrivar Berlingarin.



## Aftur stríð um mark

Okkurt bendir á, at eitt stríð um markið millum Kanada og Grønland er á veg. Tey seinastu árini hava kanadisku myndugleikarnir kannað havbotnin einar 150 fjórðingar eystur úr Ný Funnalandi og Labrador. Úrslitið av kanningunum skal latast ST innan 2013 og er ætlað at prógva, hvussu stórur partur av havbotninum má metast sum kanadiskur, sigur KNR. Grønlendska kringvarpið sigu, at fer Kanada at krevja ræðisrætt uttan fyri verandi markið, fer Grønland at mótmæla. Mótmæli kemur væntandi eisini úr Fraklandi, sum eigur tvær smáar oyggjar har á leiðini. Kanada og Grønland eru frammanundan ósamd um Hans Ø (myndin)

# Vinstri fund í Føroyum

**Lars Løkke Rasmussen, danskur forsetisráðharri, hevur verið í Føroyum í summarfrí í eina tíð. Seinnapartin í dag kemur ein stórur partur av Vinstra til Føroya, tí tað er ikki bara frítíð á skránni. Vinstri heldur nevniliga summarfund í Føroyum**

FUNDUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Forsetisráðharrin í Danmark hevur verið í Føroyum saman við familjuni hjá sær í vikur nú, og seinnapartin í dag kemur ein verulig innrás av Vinstrafólkum við flogfarið úr Danmark.

Tað er ikki bara til gaman, at øll hesi 80 fólkini koma úr Danmark. Tað er nevniliga soleiðis, at flokkurin skal halda summarfundin hjá flokkinum í Føroyum, og hann verður fríggjadagin.

Vinstri hevði eisini fund í Føroyum í 1992, tá Uffe Ellemann Jensen var formaður í flokkinum.

### Gaman

Men gaman verður eisini á skránni. Vitjað verður á Slættaratindi, á Eiði, við Gjógv, í Haldórsvík og í havnini verður skipað fyri túri í Løgtingið, út á Reyn og á Tinganes.

Fótbóltur verður somuleiðis á skránni fríggjadagin áðrenn fundin. Tá verður dystur á Tórsvølli millum sambandsfólk og vinstrafólk. So verður spurningurin um Edmund Joensen spælir við Vinstra ella Sambandsflokkinum.

Umframt hetta fara vinstrafólkini eisini at royna seg í føroyskum róðrarbáti.



*Lars Løkke Rasmussen var í morgun í Kirkjubø saman við familjuni. Seinnapartin koma floksfelagarnir til Føroya*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Metnógvir klamydia tilburðir

SJÚKA
*Árni Joensen*
*Árni@sosialurin.fo*

Talið á klamydiatilburðum í Føroyum er vaksið í stórum seinasta árið, og talið í fjør var metstórt. Í 2004 vóru staðfestir 146 positivir vertir (prøvar) av klamydia í Føroyum, og var tað hægsta talið higartil. Men í 2008 vóru 201 positivir, eftir at talið annars var minkað nakað aftur í 2005-2007 við 110 positivum um árið. Støðan í ár higartil hevur verið óbroytt í mun til 2008 við 117 staðfestum tilburðum.

Tað sigur Landslæknin í einari fráboðan.

Sambært tølunum eru tað fleiri kvinnur enn menn, sum verða smittaðar, men Landslæknin sigur, at orsøkin til hetta er allarhelst hon, at fleiri teirra verða kannaðar enn menn, eitt nú í sambandi við kanning áðrenn spiral, undirlívskanning og barnsburð.

Føroysku klamydiatølini eru heldur lægri enn í hinum norðurlondunum, men Landslæknin ger vart við, at tað eru lutfalsliga færri, ið lata seg kanna í Føroyum. Tað eru tí allarhelst fleiri í Føroyum lutfalsliga enn í hinum norðurlondum sum heild, ið ganga við sjúkuni (og við hesum tí eisini smitta onnur) uttan at vita av tí, skrivar Landslæknin í fráboðanini.

